# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



*Trý systkin: Andrias K. Henriksen, Arnold K. Henriksen, og Jona K. Henriksen*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*



*Fyrrverandi starvsfelagar. Arnold K. Henriksen og Ásmund Justinussen arbeiddu saman á Fiskirannsóknarstovuni í 60-unum. Ásmund segði frá hesum tíðarsekeiði undir móttøkuni*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Arnold K Henriksen:

## 40 spennandi ár við fiskiroyndum og fiskifrøði

**Hósdagin 1. apríl var almenn móttøka á Fiskirannsóknarstovuni í Nóatúni í sambandi við at Arnold K. Henriksen hevði arbeitt á stovninum í 40 ár**

Nógv fólk vóru til móttøkuna bæði familja, vinir og núverandi og fyrrverandi starvsfelagar.

Stjórin á Fiskirannsóknarstovuni, Hjalti í Jákupsstovu, helt eina talu, har hann í stuttum greiddi frá arbeiðnum hjá stovninum og segði m.a. at arbeiði hjá Fiskirannsóknarstovuni er í høvuðsheitum at fylgja við broytingunum í sjónum.



*Jákup Sverri Joensen, fyrrverandi stjóri á Fiskirannsóknarstovuni, Arnold K. Henriksen, og Hjalti í Jákupsstovu, stjóri á Fiskirannsóknarstovuni*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Hesi 40 árini hevur Arnold luttikið í at kalla øllum tættum innan fiskiroyndir og fiskifrøði og hevur verið nógv við fiskirannsóknarskipunum Jens Chr. Svabo og Magnus Heinason.

Hann hevur øll árini havt álitisuppgávuna at greina aldurin á fiski úr nytrum og roðslum. Í hesum arbeiðnum hevur hansara partur ongantíð ligið eftir.

Hjalti segði eisini at avgerandi í øllum arbeiði er arbeiðsgleði, og humor í dagligdegnum ger dagin ríkari, og at Arnold við sínum serliga havnar-speisemi mangan hevur gjørt dagin stuttligan.

Osmund Justinussen helt eisini eina talu, har hann mintist aftur á tíðina, tá hann og Arnold arbeiddu saman á Fiskirannsóknarstovuni í 60-unum. Hann segði, at hann mintist hesa tíðina sum eina sera góða og lærurika tíð.

Arnold trívist framvegis væl í hesum spennandi arbeiðnum við fiskiroyndum og fiskifrøði.



*Arnold saman við børnunum. f.v. Palli, Arnold, Bogi og Ann*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*



*Jóna á Røgvi Olsen og Arnold K. Henriksen práta við Gunvør Hoydal*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Mia Hansen 80 ár

Í dag fyllir Lisa Maria Hansen, f. Mellemgaard, í Klaksvík 80 ár.



Mia er dóttir Elisabeth Sophie Johannensen úr heimara Horni í Klaksvík og Joen Sophus Jacobsen, sum vanliga varð róptur, Jógvan millum Garðarnar og var av Norðoyri.

Í 1947 giftist hon við William Hansen, og eiga tey børnini, Elisabeth, Olaf og Ruth. Mia eigur 8 ommubørn og 6 langommubørn.

Tað er ikki ov nógv sagt, at Mia er eitt arbeiðsgrev. Í nógv ár var hon høvuðskokkur til mangt eitt gildi, og í 25 ár vaskaði hon á Telefonstøðini í Klaksvík.

Eisini var hon saman við Eriki Olsen, sum eina tíð hevði hotellvirksemi í Klaksvík, við til at matgera til borðhald hjá bæði høgum og lágum.

Einaferð, tá danski statsmininstarin var á vitjan í Føroyum, skuldi máltíð gerast til í Oyndarfirði, og til tað vórðu Mia og Erik boðsend. Hetta var sanniliga ikki bara sum at siga tað, tí alt, bæði grýtur og matur mátti førast við bátinum, Imanuel, til Oyndarfjarðar.

Og so var tað hina ferðina - okkurt gildi skuldi vera úti á Skála - tá fóru tey við rutubáti í Eysturoynna, og máttu ganga av Gøtueiði oman á Skipanes í kava, og vórðu síðani førd víðari við báti yvir á Skála.

Tað vóru tíðir, tá lívið knossut, men gleðin yvir vælútint arbeiði kanska var so mikið størri.

Mia er trúgvandi kona, sum altíð er við tí góða orðinum. Ommu- og langommubørnini eru ógvuliga góð við hana og trívast serstakliga væl inni í hugnaliga og fjálga heiminum hjá ommuni.

Vit ynskja Miu hjartaliga tillukku á 80 ára føðingardegnum og ynskja henni Harrans signing á lívskvøldinum.

## Andlát

25. mars
Sverri Egholm, búsitandi í Miðvági, ættaður úr Streymnesi, 56 ár.

26. mars
Rasmus Poulsen, Miðvágur, 87 ár.

27. mars
Bette Nysted Hansen, Leirvík, 87 ár.

28. mars
Jens Aage Olsen, ættaður av Tvøroyri búsitandi í Keypmannahavn, 66 ár.
Ida Magnussen, Klaksvík, 88 ár.

29. mars
Jákup Haraldsen, fyrrverandi landsapotekari, 80 ár.
Inger Hansen, fyrrverandi lærari í Fuglafirði, 79 ár.
Jona Josefina Hansen av Nesi, vanliga nevnd Jussa, 76 ár.

30. mars
Dánjal Jákup Bærentsen, fyrrverandi landsdjóralækni, 87 ár.

## Fekk silvur og blómur



Heðin Midjord vann sær í farnu viku silvur heiðursmerki í Føroyameistarakappingini í Boccia. Hetta er ítróttargrein, ið verður íkað serstakliga millum fólk við breki ella sum eru tarnað á einhvønn hátt. Heðin gongur í Vágs Skúla og arbeiðir á Varda Verkstaðnum inni á Bakka í Vági. Hann er sjálvsagt errin av heiðursmerkinum. Og tað mundi eisini fløva, at skúlastjórin í Vági, Óli í Hjøllum, týsdagin eftir morgunsangin handaði Heðini blómuprýði, sum Heðin nú kann fegnast um, umframt silvurmerki, ið hann kann hava hangandi um hálsin eftir flott avrik.

**d.o.**

## Føðingar

8. mars fingu Guðrið og Søren Mohr Bisgaard, Vejle, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3620 gr.

17. mars fingu Harriet og Bárður Lydersen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 2835 gr.

22. mars fingu Unn Jacobsen og Dan Vestergaard, Birkerød, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4010.

24. mars fingu Sóleyð Karbech Mouritsen og Kenneth Pedersen, Ishøj, ein son. Hann var 48 cm langur og vigaði 2600 gr.

25. mars fingu Joan og Jógvan Hansen, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3940 gr.

26. mars fingu Lív Østerø, Vági, og Jákup K. Jensen, Tvøroyri, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3380 gr.

26. mars fingu Marjun Nielsen og Sverri Heinesen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 58 cm long og vigaði 4550 gr.

26. mars fingu Jastrid M'Gavin og Háldan Haldansen, Vestmanna, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4850 gr.

27. mars fingu Fríða S. Poulsen og Kári Annand Berg, Hvítanes, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3350 gr.

29. mars fingu Katrin Bech og Finnur Joensen eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3780 gr.

29. mars fingu Turið og Ingi á Tórgarði, Fuglafirði, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 4050 gr.

29. mars fingu Elinborg og Thorfinn Johannesen, Hoyvík, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3640 gr.

29. mars fingu Tanja Anthoniussen og Arnhold S. Simonsen, Fuglafirði, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3930 gr.

29. mars fingu Maud og Arngrím Hansen, Syðrugøtu, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3860 gr.

29. mars fingu Sonja Richmond og Hans Jørgen Hansen, Løgumkloster, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3300 gr.

30. mars fingu Brynhild Høgnadóttir og Eyðbjørn Brimnes, Velbastað, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3400 gr.

30. mars fingu Gullborg og Gunnar Nolsøe, Skopun, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3605 gr.

1. apríl fingu Miriam Hiuz og Niels Juel Arge, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3050 gr.

## Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu, tá góða mamma, vermamma og omma okkara

**Dina E. Nygaard**
Porkeri

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til prestar, sangarar, berarar og kirkjutænarar.
Tøkk til starvsfólkini á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimið fyri tíðina hon var har.
Tøkk øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðina.
Tøkk fyri blómur og kransar og fyri peningagávur til Missiónshúsið í Porkeri
Tøkk øll, sum fylgdu mammu til hennara seinasta hvíldarstað.

**Sólgerð og Eydna**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, ið sýndu samkenslu við blómum, kransum og gávum, tá ið elskaði maður mín, pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Jens Andresson**

doyði og varð jarðaður.

Takk til tykkum, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Eina serliga tøkk vilja vit senda til tykkum allar á B7 fyri altíð góða hjálp og troystarrík orð, og tykkum portørar, ið so mangan komu á nátt sum á degi, at veita okkum hjálp.

*Familjunnar vegna*

**Selinda, Hildur og Signy**